## Mentanarnáttin 7. Juni 2002 verður sett á Vaglinum kl. 18

**Barnabókasavnið**
Spurnarkapping á Barnabókasavninum ((verður) fyri børn: 0-6, 7-12 og 13-16 ár. Spurnarbløð liggja á bókasavninum alla vikuna, og svarini skulu latast inn í seinasta lagi fríggjadagin 14. Juni 2002. Vinningurin er eitt gávukort á 500 kr.til Bókasøluna í SMS. Ein vinningur er í hvørjum aldurbólki.

**Bókasølan í SMS**
Kl. 21.30 Bókmentakvøld: Sólrun Mikkelsen og næmingar á skriviskeiðnum hjá Rakel Helmsdal lesa upp. Unn Patursson syngur og Herluf Lützen spælir. Bergljót Joensen er frásøgufólk.

**Boysensgarður**
Garðurin verður opin. Spælimansorkestur spælir kl. 19

**Fornminnissavnið**
Savnið í Brekkutúni er opið til kl. 21

**Gongugøtan**
Havnar Ungdomshornorkestur selur bollar og kakao

**Havnar Kirkja**
kl. 21.30 Konsert við Tórshavnar Strúkikvartet og Fagotkvartet. Kirkjan er opin frá kl. 20.

**Hjá Skilling**
Jákup Andrias Arge sýnir fram myndir av fólki.

**Listaskálin**
Opið er til kl. 24. Rundvísingar.

**Náttúrugripasavnið**
Savnið er opið til kl. 24.

**Norðurlandahúsið**
Summarframsýningin "Sjón í Havið" letur upp kl. 22. Karin Kjølbro letur framsýningina upp, og Magnus Johannesen Trio spælir.

**Pætursastova**
Yrkjarakvøld, Petur Elias Askham Guttesen, Oddfríður Rasmussen og Steinbjørn B. Jacobsen lesa yrkingar.

**Sjónleikarhúsið**
Sjónleikarskúlin sýnir barnaleikir. "Tá mánin setir og sólin rísir" er ein leikur, sum Rakul Helmsdal hevur skrivað saman við bólkinum Koala Lumpa(u?)r.Sýningin er kl. 17 og er fyri øll.
Kl. 18 verður "Margrethukvæðið" framført (egin dramatisering). Børn undir 7 ár skulu vera saman við foreldrum.
Leikhúscaféin er opin.

**Sjónleikarhúsið**
kl. 23-02 Føroyskur Dansur.

**Smiðjan í Lítluvík**
Framsýning við listaverkum eftir Zacharias Heinesen, Bárð Jákupsson, Anker Mortensen, Tórbjørn Olsen, Olivur við Neyst, Amariel Norðoy, Eyðun av Reyni, Ingálv av Reyni og Kára Svensson letur upp kl. 17. Kl. 19 spæla næmingar í Tórshavnar Musikkskúla: Jón Festirstein og Jona Jacobsen, violin, og Høgni Jespersen cello. Kl. 20.30 syngur Sigrið Sivertsen og Eirikur Skála spælir keyboard. Bæði eru lærarar við Tórshavnar Musikkskúla. Opið er til kl. 23. Framsýningin er eisini opin leygardagin kl. 11-17 og sunnudagin kl. 14-18.

**SMS**
kl. 16.00 Klovnurin Hannibal og systkinnabarnið Nøffilina undirhalda.
kl. 17.00 tað sama
kl. 18.00 Fjotto og Bobo undirhalda og gera ballón skepilsir
kl. 19.00 Brandur Enni syngur.
kl. 20.00 All That Rain spæla.
kl. 21.00 Jens Marni, Pauli Magnussen og Ólavur Øster spæla.
kl. 22.00 Leikarar úr leikbólkinum Spírum framføra skemt.
kl. 23.00 Janus Kampmann og Vagnur Streymoy syngja og spæla.

**Snarskivan**
Grafisk framsýning letur upp kl. 17.30, kl. 18.30 spæla næmingar í Føroya Klarinett orkestri, og kl. 21 spælir Unglinga Hornorkestrið hjá Tórshavnar

**Musikkskúla**.
Opið er til kl. 23. Framsýningin heldur fram allan juni mánaða og er opin, tá ið Snarskivan er opin.

**Tinganes-Reyni**
Túrar við ferðaleiðara kl. 19 og kl. 21. Byrjað verður uttanfyri Gamla Bókhandil

**Útisavnið í Hoyvík**
Opið til kl. 21. Rundvísing Heima á Garði og á útisavninum kl. 18 og kl. 20.

**Vaglið**
Mentanarnáttin verður sett kl. 18. Havnar Hornorkestur spælir.

**Vaglið**
Rockkonsert kl. 23.

**Vágsbotnur**
Jazzkonsert v. Chaldur kl. 20.

# ítróttur

Nr. 105 • hósdagur • 6. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Ítróttarfólk skulu ansa sær:

## Dopingroyndir takast í Føroyum

**Á aðalfundinum hjá Ítróttarsambandi Føroya varð samtykt, at dopingeftirlit og írtóttardómstólur skulu setast á stovn í Føroyum**

ÍTRÓTTUR
*Stefan í Skorini*



*Heðin Mortensen varð afturvaldur til forseta í ÍSF, sum nú hevur tikið stig til dopingeftirlit og ítróttardómstól í Føroyum*

ÍSF hevði aðalfund um vikuskiftið, og fleiri áhugaverd mál vóru á skránni. Hetta eru mál, sum ÍSF skal lúka fyri at verða upptikin í altjóða olympisku nevndina, ið er eitt av málunum hjá forsetanum, Heðini Mortensen.

Mest kollveltandi samtyktin frá fundinum er, at føroysk ítróttarfólk framyvir verða kannað fyri doping. Dopingeftirlit skal fremjast í Føroyum, so at ítróttarfólk, ið møguliga nýta stimbrandi evni, kunnu steðgast. Hetta er eitt krav frá IOC (International Olympic Committee), og tí verður slík eftirlit eisini framt í Føroyum framyvir.

Allar framkomnar ítróttartjóðir hava slíkt eftirlit, og í hesum sambandi kann sigast, at vit hava verið eftirbátur, men nú er tíbetur vend komin í.

Umframt dopingeftirlitið fer ÍSF eisini at seta ein ítróttardómstól á stovn. Hesin Dómstólur skal taka støðu í ósemjum, sum kunnu standast av m.a. dopingroyndum.

– Dopingeftirlitsnevndin er farin til verka at fyrireika dopingroyndir í Føroyum, og bæði dopingnevnd og dómstólur eru til reiðar at taka støðu í møguligum málum, ið standast av royndunum, sigur ÍSF í tíðindaskrivi.

### Øktan ferðastuðul

Eitt annað mál, sum aðalfundurin eisini umrøddi, var játtanin til ítróttarferðir innanoyggja, sum er alt ov lítil.

– Játtanin til innanoyggja ítróttarferðir hevur verið og lítil, tí hon røkkur bert til tríggjar ársfjórðingar. Í september og oktober er játtanin uppbrúkt, og so hóttir Strandfaraskip Landsins við at steðga skipanini. Á hvørjum ári er tí neyðugt at samráðast fyri at fáa eykajáttan, so at feløgini framhaldandni kunnu ferðast til dystir og kappingar, sigur forsetin Heðin Mortensen.

ÍSF leggur dent á, at trupulleikin verður ikki loystur, fyrr enn játtanin røkkur til alt árið. Játtanin er hækkað til 1,7 milliónir krónur, men tørvurin er í veruleikanum 3 milliónir, og tí er nakað eftir á mál.

ÍSF fílist eisini á, at tað mangan ikki er pláss í bussunum hjá Bygdaleiðum, hóast feløg hava boðað frá í góðari tíð frammanundan, og at fleiri bussar ikki verða settir at koyra. Ítróttarsambandið sigur, tað ofta er tungt og ógjørligt hjá feløgum at nýta bussrutuna. Hetta rakar serliga feløgini í útjaðaranum. ÍSF heitir tí á SL og avvarðandi myndugleikar um at fáa viðurskiftini í rættlag.

ÍSF hevur í hesum sambandi gjørt eina fundarsamtykt. Hon sigur, at aðalfundurin hjá ÍSF heitir á Føroya Løgting um at játta Strandfaraskipum Landsins peningin, ið er neyðugur fyri at innanoyggja ítróttarferðir kunnu halda fram alt árið og nøkta tørvin til fulnar.

### Forða fyri misnýtslu

Ítróttarsambandið hevur í fleiri ár havt ynski um at seta ein ella fleiri ítróttarráðgevar í starv, og hetta verður nú veruleiki.

Peningur er settur av til hetta endamálið, og ein ráðgevi verður væntandi settur í starv innan stutta tíð. Endamálið við hesum starvinum er at menna og upplýsa um barna- og ungdómsítrótt, so at børn og ung kunnu hava tryggar og góðar karmar at virka innanfyri.

Ráðgevin skal eisini syrgja fyri, at børn verða vard ímóti kynsligum ágangi, sum hevur verið ein stórur trupulleiki í fleiri donskum ítróttar- og frítíðarfeløgum seinastu árini.

Ráðgevin skal eisini syrgja fyri, at upplýst verður um vandan við rúsandi evnum, royking og doping og at minni ment eisini fáa møguleikar innan ítróttina.

Ítróttur er mentan

Fundarluttakararnir funnust eisini harðliga at nýggja mentanarálitinum, sum varð lagt fyri tingið, áðrenn tað fór heim undan valinum. Orsøkin til atfinningarnar var, at ítrótturin als ikki varð umrøddur í álitinum. Hetta hildu fólk vera løgið, tí umleið 15.000 íðkandi ítróttarfólk eru í Føroyum.

Óli Holm, fyrrverandi landsstýrismaður við mentamálum, sum legði álitið fyri tingið, segði, at ein arbeiðsbólkur verður sett í næstum, sum skal gera serstakt ítróttarálit.

Annars varð Heðin Mortensen einmælt afturvaldur til forseta í ÍSF í eitt nýtt tvey ára tíðarskeið. Hann hevur sitið sum ovasti í ítróttarsambandinum síðan 1980.

## Føroyskar kvinnur vunnu kappróður

*Føroysku kvinnurnar, ið vunnu kappróður í Íslandi á sjómannadegnum, sum var sunnudagin. Frá vinstru eru tað Elin, Marina, Palma, Kirstin, Leila, Sólrun og Anna*



KAPPRÓÐUR
*Stefan í Skorini*

Sunnudagin 2. juni var sjómannadagurin hildin kring alt Ísland, og eitt av tiltøkunum var kappróður. Føroyskar kvinnur í Íslandi høvdu tikið seg saman og mannaðu ein bát til kappróðurin.

Fýra manningar høvdu boðað frá luttøku hjá kvinnunum, og talið av manningum var eisini fýra hjá monnum. Kvinnurnar sigraðu, meðan menninir endaðu á triðja plássi.

Føroysku kvinnurnar vunnu við tíðini 3 minuttir og 5 sekund. Beint aftanfyri var Stefnir frá Suðavík. Ein manning, sum nevndi seg Gazellurnar, endaði á triðja plássi, og løgreglukvinnur endaðu á triðja fjórða plássi.

Hjá monnum vann Stefnir frá Suðavík, og føroyska manningin endaði sum nummar trý.

## Stevnur fyri tey yngru

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Leygardagin 8. juni verða tær fyrstu Yngststevnurnar hjá Fótbóltssambandi Føroya hildnar kring landið. Stevnurnar eru í Leirvík, á Eiði, á Argjum, í Sandavági og á Tvøroyri. Fleiri stevnur eru eisini á skránni 22. juni.

FSF hevur í hesi vikuni skipað fyri kunnandi fundum fyri venjarum og áhugaðum um Yngstverkætlanina. Ætlanin var at hava eitt impulsskeið um verkætlanina, men hetta varð avlýst vegna verkfall. Á fundunum hava venjararnir tosa um hugburðin og innihaldið í átakinum »Yngst«.

Børnini, sum eru við á hesum tiltøkum, eru fødd í 1993 og 94.